# Fólkatingið farið til verka

**Sosialurin var við, tá nývaldi fólkatingslimurin Anfinn Kallsberg byrjaði sítt politiska starv á Christiansborg týsdagin**

MYNDAFRÁSØGN CHRISTIANSBORG

*Marjun Dalsgaard*
*Mynd: Símun J. Hansen*



*Anfinn Kallsberg og Høgni Hoydal hava ymiska áskoðan á leiklutin hjá føroyskum fólkatingslimum: - Eg fari ikki at draga føroyska sjálvstýriskjakið inn í fólkatingið, tað hoyrir ikki heima her, sigur Anfinn.*

Týsdagin kom fólkatingið saman aftur eftir valið 8. februar, og nývaldi fólkatingslimurin Anfinn Kallsberg heilsaði uppá nýggju starvsfelagirnir.

– Eg ætli mær ikki at leggja meg út í donsk viðurskifti, og eg ætli mær ikki at draga sjálvstýriskjakið inn á Christiansborg, tí tað hoyrir heima í Føroyum, sigur Anfinn Kallsberg fyrsta dagin til arbeiðis. Hann leggur aftrat, at hann ætlar sær at nýta alla sína orku uppá at ávirka felagsmál og viðurskifti, sum kunnu viðvíkja Føroyar á ein hvønn hátt.

Anfinn Kallsberg er ikki partur av Norðuratlantsbólkinum, men hevur eina samstarvsavtalu við Konservativa Fólkaflokkin.

– Tað er týdningarmikið at hava samband við tey røttu fólkini, um tú skalt hava nakra ávirkan. Hevur tú ikki tað, er tað sum ein oyðimarkargongd. Eg havi fingið eina avtalu í lag, soleiðis at eg kann koma í allar tær nevndir sum við-



*Pia Gjellerup, forkvinna í tingbólkinum hjá Javnaðarflokkinum, heilsar uppá Anfinn Kallsberg og Høgna Hoydal*



*Høgni Hoydal og Lars-Emil Johansen í fólkatingssalinum.*



*Anfinn Kallsberg hevur nú funnið sess sín á Christiansborg*



*Tveir javnaðarmenn og Høgni Hoydal fáa fáa sær eitt prát. Lars-Emil Johansen, Høgni Hoydal og Frank Jensen, ið stillar upp til formannsvalið hjá danska Javnaðarflokkinum.*



*Birthe Rønn Hornbech frá Vinstraflokkinum og Line Barfod frá Einheitslistanum ynskja Høgna Hoydal tillukku.*